## Albert verður HB-venjari

Nevndin í P/F Havnar Fótbóltur hevur sett Albert Ellefsen í starv sum venjara hjá formula-liðnum hjá felagnum. Hetta saman við Frankie Jensen, sum verður hjálparvenjari. Í tíðindaskrivið sigur nevndin, at tey rokna við, at hesir báðir kunnu lyfta uppgávuna saman við spælarahópinum. Fremsta uppgávan verður her at vinna liðið í steypafinaluna, umframt at betra um støðuna í Formula-deildini. Felagið skal í altjóða kapping í næstu viku, tá ferðin gongur til Íslands at leika Champions League móti Íslendsku meistarunum úr Hafnafirði. Báðir hava teir lokið hægstu venjaraútbúgving, og Albert hevur harafturat drúgvar royndir sum venjari, m.a. sum hjálparvenjari hjá Havnar Bóltfelag í fleiri ár.

## Fingu Serbia og Ísrael

Føroyska hondbóltslandsliðið skal í januar mánaði spæla EM-undankappingardystir móti Serbia og Ísrael. Tað var úrslitið, nú lutakastið til EM-undankappingina var á skránni. Og Føroyar fara at taka lut, sigur formaðurin í HSF, Kristian Johansen. - Tað er einki at tosa um. Vit síggja ikki hesa luttøkuna sum nakran trupulleika, men heldur sum eina velduga avbjóðing, sigur hann.
Dystirnir móti Serbia standa á skránni at verða spældir 2. til 4. januar, meðan teir móti Ísrael skulu spælast tann 9. til 11. januar. Kristian sigur, at tey nú fara at samráðast um, hvørt tað er møguligt at broyta skránna, soleiðis at fleiri enn tveir av dystunum kunnu spælast í Føroyum.

# Aganevndin dumpaði



*50 dagar gingu, frá seinasta bríksli á vøllinum hevði ljóðað, til Aganevndin hjá FSF hevði gjørt sín úrskurð í kærumálinum*
*savnsmynd/Álvur Haraldsen*

**Longu í fyrstu royndini eydnaðist nýggju Aganevndini hjá Fótbóltssambandinum at nýta 50 dagar til eina kæruviðgerð**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tann 13. mai spældu B36 og Skála landskappingardyst í Formula-deildini. B36 sendi beint eftir dystin inn kæru um, at Skála hevði gjørt nýtslu av Slavisa Kaplanovic, hóast hesin – av misgávum – ikki stóð skrivaður á dómaraseðilin.

Tað kærumálið í fjør, sum fekk nógv tí størstu fjølmiðlaumrøðuna, var málið í steypakappingini um spæliloyvið hjá Páll M. Joensen. Millum nógvar atfinningar um tað málið, varð eisini ført fram, at málsviðgerðin hevði verið alt í verðini ov drúgv. Væl oman fyri 100 dagar.

Tá nýggju reglurnar fyri FSF vórðu samtyktar í vár, sást hetta eisini aftur í reglunum fyri Aganevndina. Har varð nevnliga staðfest, at miðjast skuldi eftir, at kærumál altíð vórðu viðgjørd eftir tveimum vikum, uttan so at heilt serlig viðurskifti talaðu fyri eini drúgvari viðgerð.

Tvær vikur eru kanska dekan ov knøpp tíð, um allar hoyringsfreistir í einum máli skulu haldast. Og tað skulu tær. Men tá dómurin frá Aganevndini kom – tann 3.juli – vóru lidnir 50 dagar, síðani dysturin varð spældur. Og eitt mál, sum tey flestu hildu vera avgreitt við eini bót til Skála, hevði nú brádliga avgerandi ávirkan á oddastríðið í Formula-deildini.

Skála hevur longu kært málið til yvirkærunevndina. Men verður málsviðgerðin her eins drúgv, fer august mánaður um at vera runnin, áðrenn endalig greiða fæst á, hvussu stigatalvan eigur at síggja út.

## Formula-liðið



*Sosialurin mannar Formula-liðið við spælarunum, sum stóðu seg best í 16. umfari av Formula-kappingini*

## Høvdu nógvar møguleikar

Tað er neyvan nakar ivi um, at Skála framdi brot á kappingarreglurnar, tá teir í dystinum tann 13. mai skiftu Slavisa Kaplanovic inn í dystinum móti B36.

Men tað verður frá nógvum síðum reistur spurningur um, hvørt tað var neyðugt av Aganevndini at døma felagið at tapa dystin.

Og stutt svarað, so var hetta ikki neyðugt. Tá brot verða vigað, eru 13 ymiskir møguleikar, sum eitt felag kann revsast eftir. Og av hesum hevur Aganevndin valt tann áttanda í røðini.

Í reglugerðini fyri FSF stendur:

Brot á viðtøkur, kappingarreglur ella aðrar fyriskipanir innan FSF kann verða sekta soleiðis:

a) átalu
b) ávarðing
c) bót
d) døma felag at missa heimavøll
e) seta bann fyri at flyta leikarar
f) áseta dyst/ir at skula leikast uttan áskoðarar
g) áseta dyst/ir at leikast á uttanveltaðum vølli
h) døma felag at tapa dyst
i) frátaka ella tilluta stig og mál
j) frátaka felag heiðursmerki
k) strika meistaraheiti
l) døma lið at flyta í lægri deild
m) koyra felag úr kapping